## Serana Williams nýtt met

Amerikanski tennisspælarin, Serena Williams, hevur sett nýtt met í kvinnutennis, tá talan er um at forvinna sum mest av peningi eftir einum kappingarári. Í 2009 hevur hon forvunnið umleið 33 milliónir krónur fyri innsatsin á sjálvum tennisvøllinum, ið millum annað taldi sigrar í Australian Open og Wimbledon, og tað er tað mesta nakrantíð. Frammanundan átti belgiska Justine Henin metið, sum er afturi frá 2007, tá hon spældi sær 28 milliónir krónur inn á bók.



## Prokop leggur frá sær

Gunnar Prokop leggur nú frá sær sum venjari hjá eysturríkska hondbóltsfelagnum, Hypo Niederösterreich, eftir at hann í einum Champions League-dysti valdi at fara inn á vøllin at steðga einum skjótálopi hjá mótstøðuliðnum, tá bara fýra sekund vóru eftir at spæla. At hann gjørdi tað, tryggjaði felag hansara javnleik, men aftaná hevur Prokop sagt seg harmast um hendingina. Europeiska hondbóltssamgongan, EHF, hevur sett eina kanning í verk av hendingini, ið óivað fær avleiðingar fyri Prokop, hóast hann nú sjálvur hevur valt at lagt frá sær.

# Fimleikakapping við lí



Eitt av amboðunum, sum kvinnurnar nýta er bitin, har vann Støkk flestu stigini, sum avgjørdu kappingina hjá kvinnum

**Um vikuskifti var Føroyameistarakapping fyri lið í fimleiki, men tað merkist, at Oyggjaleikirnir eru farnir aftur um bak og steðgur hevur verið hjá teimum flestu, tí stigini vóru ikki so øgiliga høg. Somuleiðis høvdu bara fýra av átta kappingum meira enn eitt lið**

eij@sosialurin.fo



Eirikur í Jákupsstovu

Føroyameistarar vóru funnir í liðkappingum í fimleiki um vikuskiftið, men í fleiri greinum var tað ikki beinleiðis torført at finna vinnararnar.

Hjá monnum, mansunglingum, dreingjum og kvinnuunglingum var nevniliga bara eitt felag umboðað, so longu áðrenn kappingina var greitt, at Havnar Fimleikafelag var Føroyameistari hjá monnunum, mansunglingum og dreingjum, meðan Støkk áðrenn kappingina átti Føroyameistararnar hjá kvinnuunglingum, tí felagið í Eysturoynni hevði somuleiðis einasta liðið.

### Kvinnur

Men fara vit til kappingarnar, har kapping var, so kappaðust kvinnurnar tíðliga seinnapartin leygardagin.

Støkk og Havnar Fimleikafelag høvdu hvør sítt lið í kappingini, sum var nærum avgjørd til fyrimuns fyri Støkk, áðrenn seinasta amboðið, gólvið, varð tikið í brúk.

Tá avtornaði hevði Støkk vunnið sær 113,95 stig, meðan Havnar Fimleikafelag hevði 105,30 stig.

Hjá Støkk var tað serliga Kristina Toftegaard, sum eisini vann heiðursmerki á Oyggjaleikum, sum gjørdi størsta takið, og tað var serliga á bitanum og á gólvinum, at hon var eitt vet frammanfyri hinar.

Verður hugt at ymisku amboðunum, so gav lop mestu stigini, meðan forskotna barran, sum ikki hevur verið við so leingi, gav størstu trupulleikarnar. Veikasti luttakarin, sum taldi við megnaði bara at fáa 2,7 stig. Til samanberingar gav lopið hjá Katrini Wardum úr Havnar Fimleikafelag 12,550 stig.

### Menn

Hjá monnunum var bara eitt lið, so tað var greitt, at Havnar Fimleikafelag fór at vinna. Eisini er skjótt at leggja til merkis, at bara tveir av luttakarunum á Oyggjaleikum, Rósing Dam og Øssur D. Eiriksfoss, vóru við í kappingini. Hesir báðir fingu umleið dupult so nógv og meira stig enn hinir luttakararnir. Bestur á



Gólvið er amboðið, har luttakararnir hava longst tíð



Myndir: Álvur Haraldsen